# Dropar og Glymur í Mariukirkjuni




Tey bæði kórini fara saman at hava fjølbroytta jólakonsert nú leygardagin. Hetta er aðru ferð, at tey bæði kórini hava jólakonsert saman, og verður hendan hesa ferð hildin í Mariukirkjuni í Havn.

Dropar er barnakór undir leiðslu av Sigrid Sivertsen, og er kórið millum annað kent frá sangleikinum Jósef. Millumn onnur høvi, ið kórið hevur sungið til, kann nevnast krúnprinsavitjanin, tá kórið sang í Vágsbotni. Glymur, sum varð stovnað 1984, hevur seinastu 3 árini verið undir leiðslu av Julian Rasmussen. Henda konsertin verður tann seinasta undir hansara leiðslu í hesum umfari. Í komandi ári fer hann at nema sær útbúving innan tónleik í Danmark.

Skráin, ið er sett saman av sangum og sálmum, ið hoyra jólunum til, er fjølbroytt, og fara kórini, umframt at syngja hvør sín part, eisini at syngja saman í seinnu helvt av konsertini.

Konsertin leygardagin er ókeypis.




















